ØKISTÆNASTAN
Í SANDOYAR SÝSLU

**Søkt verður eftir húsavørði til tíðaravmarkað, fulltíðarstarv starv, frá 01.02.-2021 ella skjótast tilber til og við 31.01.-2022. Setanartíðin verður møguliga longd.**

Starvið er fjølbroytt og fevnir um umsjón og viðlíkahald av bygningum, økinum uttan um bygningar, og bilum hjá Økistænastuni. Harumframt fevnir starvið um portørtænastu og vørukoyring. Í samstarv við innkeypara hevur húsavørðurin eisini ábyrgd av køkstænastuni.

## Førleikakrøv:

Tann ið settur verður í starvið, skal helst hava loki útbúgving sum timburmaður, elektrikari, maskinmeistari ella vera hegnigur bæði til tað tekniska og tað handverksliga. Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving hava fyrimun.

- Duga at arbeiða sjálvstøðugt
- Vera fyrikomandi og hava góð evnir at samstarva
- Dáma at verða um eldri og fólk við skerdum førleikum
- Sjálvstøðugt kunna síggja og loysa smærri umvælingaruppgávur
- Hava eitt gott yvirlit
- Verða álítandi og ábyrgdarfullur

## Vit kunnu bjóða:

- Eitt jaligt og mennandi umhvørvi, har trivnaður fyri øll hevur høga raðfesting.
- Góða upplæring

## Setanarviðurskifti:

Starvið verður sett sambært sáttmála við KAF/ Fíggjarmálaráðið og avvarðandi felag.

Um tú ynskir at vita nærri um starvið, er tú vælkomin at seta teg í samband við økisleiðaran Randarsól Kristiansdóttir, telefon 793601 ella teldupost ot@ot.fo

**Umsókn:**

Skrivlig umsókn við avritum av prógvi v.m. skal verða okkum í hendi í seinasta lagi **18.02-2021.**

Umsóknin skal sendast til

***Økistænastuna í Sandoyar Sýslu, Miðgøta 8, Fo-210 Sandur*** ella á teldupost ***ot@ot.fo***
***Att: Randarsól Kristiansdóttir***